# Sosialurin 75

Í sambandi við at Sosialurin fyllir 75 ár bjóða vit tær at tekna teg sum haldara fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum og samstundis at vera við í kappingini um hesar báðar vinningarnar:



**1. Tøm Miklagarð**

Í 10 minuttir kanst tú fylla so nógvar vørur í innkeypsvognin í Miklagarði í SMS, sum tú fært stundir til ... men bara eitt av hvørjum.

**2. Dreymaferð við nýggju Norrönu**

Vinn eina familjuferð við nýggju Norrönu hjá Smyril Line fyri 2 vaksin og 2 børn við bili




**Ja** eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum

Navn ____________________

Bústaður ____________________

Býur/bygd ____________________

Tel ____________________

e-mail ____________________

Send seðilin skjótast gjørligt til:
Sosialurin, Argjavegur 26, 160 Argir
ella faksa hann til fax nr. 314720




# Nei til grein 19-kanning

**Løgmaður eigur at reinsa seg, men tá Tjóðveldisflokkurin hevur sligið manngarð um løgmann og valt at liva við fortíðini hjá honum, so er einki hjá okkum at gera, sigur Jóannes Eidesgaard, sum ikki heldur tað verða rætt, at ein grein 19 nevnd skal kanna løgmann**

MÁLIÐ UM LØGMANN
*Eirikur Lindenskov*

– Javnaðarflokkurin er sera ivasamur, um rætt er at seta eina grein 19 nevnd at kanna fortíðina hjá løgmanni.

Hetta sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins. Orsøkin er, at flokkurin ivast í, hvat tað næsta málið kann verða, sum verður lagt fyri eina grein 19 nevnd at kanna. Men hann skilir væl, at fjølmiðlarnir eru áhugaðir í eini slíkari kanning, tí tá koma øll skjølini á borðið.

– Vit ivast í, um tað er setningurin hjá ein grein 19 nevnd at kanna sivilu og privatu fortíðina hjá politikarum, so sum Sjúrður Rasmussen, løgfrøðingur á Løgtingsskrivstovuni hevur víst á, sigur Jóannes Eidesgaard. Hann hevur kortini merkt sær, at aðrir advokatar siga, at málið um løgmann hevur so stóran almennan áhuga, at tað saktans kann verða umfatað av eini grein 19 nevndarkanning.

Jóannes Eidesgaard heldur tó, at sivila rættarskipanin er tann rætta at viðgera slík mál, og hann sær ein vanda í at byggja upp eina politiska skipan at kanna fortíð hjá politikarum.

### Kann draga málið út

Onnur orsøk til ivan hjá Javnaðarflokkinum er, at ein grein 19 nevnd eisini kann brúkast til at tváa hendur við. Um málið um fortíðina hjá Anfinni Kallsberg og Jørgeni Niclasen verður kannað av eini grein 19 nevnd, so kann hetta taka rættuliga langa tíð – kanska eini 2-3 ár, og tá er tað mesta farið av valskeiðinum – so um tingið hevur kunna livað við teimum so leingi, so er eingin orsøk til tá at koyra teir frá, heldur hann. Tí kemur ein slík kanning ikki til sín rætt.

Jóannes Eidesgaard vísir tó á, at um ein grein 19 nevndarkanning kom til ta niðurstøðu, at løgmaður og Jørgen Niclasen høvdu gjørt okkurt kriminelt, so verður kanningin kortini bara løgd fyri tingið, og í tinginum hevur samgongan meiriluta. Tann meirilutin sær størri í at sita við valdið, heldur enn at fremja rættvísi, so tá kann tað gera tað sama kortini, heldur hann.

### Sláa garð um løgmann

Formaður Javnaðarfloksins sigur víðari, at Tjóðveldisflokkurin hevur sligið garð um løgmann. Treytin fyri at halda fram í samgonguni er, at Tjóðveldisflokkurin má liva við fortíðini hjá løgmanni, og tað ger hann eftir øllum at døma.

Jóannes Eidesgaard heldur, at tað einasta rætta, løgmaður átti at gjørt, var at reinsað seg sjálvan og løgmansembætið.

– Men tað ger løgmaður ikki. Hann spenti vøddar móti løgtinginum, og hann vann. Tórbjørn Jacobsen mátti krúpa til krossin, sigur Jóannes Eidesgaard, sum leggur afturat, at løgmaður eisini spenti vøddar móti sær í tinginum eftir ólavsøku.

– Hann vildi hava meg at reisa misálit móti løgmanni, men tað kunnu vit sjálvandi ikki gera, tá løgmaður hevur ein meiriluta av tinginum við sær. Tað hevði verið tað sama sum at givið løgmanni eina álitisváttan, og tað vilja vit ikki verða við til, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaður Javnaðarfloksins harmast um, at hetta málið ikki verður loyst. Hann heldur, at hetta gevur eitt sera ringt signal til eftirtíðina.

– Tað er harmuligt, at valdsharrarnir velja valdið, og at vit harvið fáa bananrepublikanskar tilstandir, heldur Jóannes Eidesgaard.

Men Jóannes Eidesgaard skilir sera væl fjølmiðlarnar, sum í hesum máli rættiliga renna pannuna móti múrinum, tí teir fáa ikki hendur á nørkum skjølum, alt er dult, og tað í sær sjálvum er misteinkiligt. Hann sigur, at varð ein grein 19 nevnd sett at kanna málið, so komu hesi skjølini fram.

Hann ber hetta saman við, at tveir blaðmenn í USA feldu Nixon, forseta, meðan tað í Føroyum als ikki ber til at koma til botns í einum so álvarsomum máli, sum skuldsetingarnar móti løgmanni eru.



*– Javnaðarflokkurin heldur ikki, at ein grin 19 nevnd er rætti mátin at kann sivilu fortíðina hjá politikarum. Slík mál eiga at verða viðgjørd í rættarskipanin. Men Jóannes Eidesgaard harmast um, at málið um skuldsetingarnar móti løgmanni og Jørgeni Niclasen ikki verður loyst*

# Eingin nevnd at kanna løgmann

**– Men Tjóðveldisflokkurin hevur tikið málið um fortíðina hjá løgmanni upp sum eitt flokspolitiskt mál**

MÁLIÐ UM LØGMANN
*Eirikur Lindenskov*

Sambandsflokkurin er heldur ikki fyri at seta eina grein 19 nevnd at kanna fortíðina hjá løgmanni, Anfinni Kallsberg.

Lisbeth L. Petersen, forkvinna Sambandsfloksins, segði við Deg og Viku mánakvøldið, at partur av tingmanning Sambandsfloksins hevði umrøtt málið fríggjadagin, og tey vóru komin til ta niðurstøðu, at grein 19 nevndin ikki er rætta forumið at viðgera slík mál.

Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin eru sostatt samdir í hesum máli. Av tí at lítið hugsandi er, at samgongan sjálv fer at seta slíka nevnd, kann staðfestast, at ein grein 19 nevnd ikki verður sett at kanna fortíðina hjá Anfinni Kallsberg og viðurskiftini viðvíkjandi skeivu flytingunum millum Frostvirkið og feløg, sum Anfinn Kallsberg var partaeigari og stóri í.

Anfinn Kallsberg endurtók í blaðnum í gjár, at fyri honum er málið endaliga avgreitt í og við, at Tórbjørn Jacobsen skrivtliga hevur etið allar skuldsetingarnar aftur í seg. Høgni Hoydal hevur eisini fleiri ferðir sagt, at málið er avgreitt, og at talan bara er um eitt persónligt stríð millum løgmann og Tórbjørn Jacobsen.

Men nú hava Høgni Hoydal og Tjóðveldisflokkurin eftir øllum at døma broytt støðu, tí leygardagin viðgjørdi aðalstjórn Tjóðveldisfloksins málið. Einki er tó likið út um, hvør niðurstøða varð gjørd, tí tingmanning Tjóðveldisfloksins eisini skal viðgera málið, áðrenn nakað verður sagt alment. Men staðfestast kann í øllum førum, at málið nú er vorðið eitt partapolitiskt mál fyri Tjóðveldisflokkin.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á Høgna Hoydal, formanni Tjóðveldisfloksins ella Heina O. Heinesen, formanni í tingbólki floksins.

# Átti at fingið avleiðingar fyri Jørgen Niclasen

**Í øðrum londum føra mistøk til, at ráðharrar mugu fara frá. Tað átti eisini at fingið avleiðingar fyri landsstýrismannin, at Fiskimálaráðið ólógliga tók fiskiloyvi frá trolbátum, heldur Jóannes Eidesgaard**

RÁÐHARRAÁBYRGD
*Eirikur Lindenskov*

Herfyri var Fiskimálaráðið dømt í Føroya Rætti fyri ólógliga at hava drigið inn fiskiloyvi frá nøkrum trolbátum. Ábyrgdina fyri hesum hevði Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri.

– Men hetta fær ongar avleiðingar, staðfestir Jóannes Eidesgaard, sum heldur, at vit føroyingar ganga ov lætt um slík viðurskifti.

Hann ber hetta saman við málinum um SparNord bankan í Danmark fyri nøkrum árum síðani. Tá var talan um, hvørt hesin bankin átti rætt til skattligar fyrimunir í sambandi við eina bankasamanlegging. Ole Stavad var skattamálaráðharri, og rætturin staðfesti, at Skattamálaráðið hevði tulkað eina kunngerð skeivt. Ábyrgdina fyri hesum hevði sjálvandi skattamálaráðharrin, og tí loysti Poul Nyrup Rasmussen forsætisráðharri, Ole Stavad úr starvi sum skattamálaráðharri.

– Hetta var ein sjálvfylgja, sum eingin setti spurnartekin við. Ráðharrin hevði ikki gjørt nakað kriminelt, men hann hevði ábyrgdina av einum mistaki, sum Skattamálaráðið hevði gjørt. Á sama hátt er við hesum fiskiloyvunum. Jørgen Niclasen hevur sum fiskimálaráðharri ábrygdina av hesum, men eingin setur spurnartekin við, um tað er rætt, at hann heldur fram í starvinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Í Danmark er tað ein meginregla, at um nakað ivi verður sáddur um ein ráðharra, so fer hann frá.

Tá Nyrupstjórnin tók við í januar í 1993, varð Pia Gjellerup útnevnd til lógmálaráðharra. Dagin eftir kom fram, at hon var nevndarlimur í einum skeiðsdepli hjá Danmarks Socialdemokratiske Ungdóm, sum var farin av knóranum. Tað var nóg mikið. Pia Gjellerup var eftir 36 tímar í ráðharrasessin loyst úr starvi.

Somuleiðis var við unga ráðharranum hjá Poul Schlüther, Anders Fogh Rasmussen. Hann var skattamálaráðharri, og hann hevði sett nakrar reglur fyri alment innkeyp. Men hansara egna ráðharrastova helt ikki hesar reglur, og tað var eisini nóg mikið, hann varð loystur úr starvi.

– Tað eru so mong dømi um, at ivi er sáddur um ráðharrar í Danmark. Teir nýtast ikki at hava gjørt nakað kriminelt, men bara tað, at teir hava ábyrgdina av einum mistaki er nóg mikið til, at teir verða loystir úr starvi – og fleiri av teimum eru seinni aftur vorðnir ráðharra aftur seinni, ein enntá forsætisráðharri, sigur Jóannes Eidesgaard.

